# eg ei





av møtinum

Mynd: Jens Kr. Vang



– Eingin fer óávirkaður út aftur av einum møti. Eitt slíkt møti fær altíð avleiðingar fyri tann einstaka, kanska at fara uppí andaligt arbeiði, at vitja fólk, sum forbiðari ella at bera fram ein persónligan vitnisburð, segði Olaf Magnussen í talu síni

Mynd: Jens Kr. Vang

” *Ein dagin spurdi ein starvsfelagi meg, um Jesus altso var til? Hann hevði ilt við at trúgva tí. Men eg hevði eitt sindur ilt við at greiða honum frá tí beint tá, hóast eg sjálvur veit at hann er til og at hann er mín*

# – Er Jesus til?



*Undan eini missiónsviku verður nógv biðið – og eisini á hvørjum møti*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Eftir taluna verður orðið givið frítt. Hesa løtuna hevur ein og hvør møguleika at bera fram ein persónligan vitnisburð – út frá tí sum talarin hevur borið fram ella hvat nú einaferð liggur fólki á hjarta**

MØTI

Nógv ung fólk eru á møtinum og tey smæðast ikki burtur við at avleggja ein vitnisburð, sum tað vanliga verður nevnt.

Triði maðurin at bera ein vitnisburð fram er enn ein ungur maður. Hann stendur í læru til eitt handverk, og har práta tey ofta um ymisk viðurskifti, eisini andalig.

– Ein dagin spurdi ein starvsfelagi meg, um Jesus altso var til? Hann hevði ilt við at trúgva tí. Men eg hevði eitt sindur ilt við at greiða honum frá tí beint tá, hóast eg sjálvur veit at hann er til og at hann er mín.

– Tá var tað so gott at útvarpið stóð frá júst hesa løtuna. Beint aftaná spældu teir nevniliga sangin "Jesus navnið aldri bliknar". Hesin sangurin var líkasum svarið uppá tann spurningin, segði hesin ungi maðurin.

### Leiðin fram

Eftir henda unga mannin komu fleiri vitnisburðir frá ungdómi og meiri tilkomnum fólki. Felagsnevnari fyri allar hesar var spurningurin um tað at fylgja Jesusi og hvat tað kostaði tí einstaka.

Tað er helst so sum ein teirra tók til: – Eingin okkara kemur til Himmals bara við at fylgjast við teimum sum ganga á møti. Vit mugu sjálvi taka eina avgerð. Vit mugu sjálvi trúgva á Jesus.

Klokkan er nú farin av hálvgum tíggju og møtileiðarin rundar møtið av við einum góðum orði at enda. Ætlanin var enda møtið við sálminum: "Eg fátækur snúgvi mær faðir".

Men tann ungi maðurin, sum fyrstur vitnaði, hevur biðið hann um at syngja ein heilt annan sang: "Eg vil fylgjast við tær, kæri frelsari mín, tín er leiðin, sum ganga eg vil!"

Betri kundi møtið neyvan endað!

## Eitt vanligt møti

Møtið í gjárkvøldið var ikki so nógv øðrvísi enn hini møtini í missiónsvikuni. Tó vóru rættiliga nógvir persónligir vitnisburðir frá fólki.

**Skráin var annars henda:**

1. Bønarmøti
2. Byrjunarsangur
3. Orð til inngang
4. Kunngerðir
5. Sangbólkur
6. Felagssangur
7. Tala
8. Felagssangur
9. Vitnisburðir
10. Sangbólkur
11. Orð at enda
12. Felagssangur
13. Kaffi og hugnalig samvera

## Skráin fyri restina av vikuni

**Missiónsvikan byrjaði sunnukvøldið og heldur fram alla hesa vikuna kl. 20 við hesi skrá:**

| | | |
|---|---|---|
| Mikudagur | Talari: | Ámund Berthelsen |
| | Sangur: | Meinigheitskórið í Havn |
| Hósdagur | Talari: | Pól Johannesen |
| | Sangur: | Ungdómskórið í Havn |
| Fríggjadagur | Talari: | Bjartur F. Johannesen |
| | Sangur: | Hanna og Erla |
| Leygardagur | Kl. 10: | Bibliutími við Hera Kjærbo: Missiónin, perspektivið í trimum teimum fyrstu evangeli'unum |
| | Møti kl. 20: | Talari: Reimund Langgaard |
| | Sangur: | Ungdómskórið í Vágunum |
| Sunnudagur | Kl. 14 familjumøti. | Sangur: Gentukórið í Meinigheitshúsinum |
| | Kl. 18 møti: | Talari: Vagn Foldbo |
| | Sangur: | Glyvrakórið |